
















# Forkela sansirnar
# í Reykjavík

sansir.fo

Bara 1 tíma og 15 minuttir á flogi og tú ert í íslendska høvuðsstaðnum. Reykjavík er ein evropeiskur høvuðsstaður við øllum, sum hartil hoyrir. Hann er kendur fyri sítt fjøltáttaða og modernaða handilslív, mongu matstovurnar og sítt ríka mentanarlív. Vøruúrvalið í teimum nógvu handlunum er tað besta av tí besta mótanum beint nú, bæði hvat viðvíkir klæðum, listahandverki ella onkrum heilt øðrum. Eisini er býurin eyðkendur fyri matgerð á sera høgum støði; har ber til at eta franskan, italskan, kinesiskan, indiskan og sjálvandi eisini íslendskan mat. Í Reykjavík kanst tú bloyta likamið í mongu uttandura hyljunum við vatni beint úr undirgrundini, og uttanfyri býin liggur Bláa Lónið, sum er heimskent fyri sítt lekjandi vatn.

Her er alt fyri sansirnar, og tí kann eitt langt vikuskifti á einum av teimum mongu modernaðu hotellunum vera ein undurfull frítøta bæði fyri einstaklingar, pør og familjur. Reykjavík hevur alt, sum krevst fyri at fáa eitt heilt serligt vikuskifti...

## VIKUSKIFTI Á HOTEL PLAZA

Fríggjadag til mánadag

Fyri hvønn í dupultkamari: Kr. **3.475,-**




**Hotel Plaza** liggur væl fyri mitt í Reykjavík. Hotellið hevur væl útgjørd kømur; stóra og góða móttøku og barr, har tú kanst hvíla teg eftir ein væleydnaðan túr í býnum. Sí meira á www.plaza.is

**Íroknað prísin er:**
Flogferð Vágar – Reykjavík og aftur við øllum avgjøldum.
3 nætur á Hotel Plaza í dupultkamari við morgunmati.

Eykanátt fyri hvønn í dupultkamari, kr. 485,-
Eyka fyri einakamar, kr. 870,-

Tilboðið er galdandi til 25.03.07

Bilegg ferðina hjá Atlantic Airways ella frá: **Faroe Travel**, tel 34 26 00 · **Flogfelag Føroya**, tel 34 00 00 · **Fonn Flog**, tel 47 63 63

Tel 34 10 10 · Fax 34 10 01 **ATLANTIC AIRWAYS** atlantic.fo